**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til Sumarmót Íslands 2023

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi úttøkuskipan til Sumarmót Íslands 2023, sum verður í Hafnarfirði í Íslandi hin 10. og 11. juni 2023.

Úttiknir verða umleið 15 ungir svimjarar við aldur til hesa stevnu, sum tá ikki eru úttiknir til aðra uttanlanda landsliðsuppgávu hjá Svimjisambandi Føroya, summarið 2023.

Svimjarar skulu sum eitt minstakrav hava aldur og hava klárað ásettu kravtíðir hjá íslendingum, sum lýst í innbjóðingini til hesa stevnu.

Um neyðugt er at avmarka hópin, so verður tað gjørt við at hyggja at hvussu høgt FINA-stig hesi viðkomandi hava klárað í síni bestu grein, í kravtíðarskeiðnum.

Sí FINA 2023 talvurnar her:

- Kvinnur: https://resources.fina.org/fina/document/2023/01/16/cd577d02-6a50-4e66-b285-8a4f3baf5539/World-Aquatics-Points-LCM_2023_Female.pdf
- Menn: https://resources.fina.org/fina/document/2023/01/16/32866515-0469-426c-a2b4-856de245302a/World-Aquatics-Points-LCM_2023_Male.pdf

Roynt verður at hava rímiliga umboðan av báðum kynum, tvs. at munur kann vera í FINA-kravinum.

Aldursbólkur SSF til hesa stevnu eru gentur føddar í 2009 ella fyrr og dreingir 2008 ella fyrr. Um onkur drongur føddur í 2009 skuldi skarað burturúr, so ber møguliga til at fáa hann við eisini.

Starvsnevndin og landsliðsvenjarin tilskila sær rætt at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing.

Starvsnevndin og landsliðsvenjarin tilskila sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2023.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 1. september 2022, til og við 21. mai 2023 (SuSvim Open).

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS